# KRIMI DROTNINGAR SITA TRYGGAR Á TRÓNUNI



ÓNDSKAPUR, DEYÐI OG TAMPAX, SUM DETTUR ÚR TASKUNI. HJA **KVINNULIGU KRIMIHØVUNDUNUM** ER ONKI OV STÓRT ELLA OV SMÁTT AT SKRIVA UM. LIZA, KARIN, ANNA OG HINAR VINKONURNAR HAVA ENDURREIST **KRIMISJANGRUNA** Í NORÐURLONDUM.



**BØKUR**

Inna Tørnroos
inna@sosialurin.fo

»Ein miljón fólk kunnu skrivað sum Liza Marklund, men bara ein kann skriva sum Bjørn Ranelid«.

Hetta segði svenski høvundin Bjørn Ranelid um starvsfelag sín Lizu Marklund.

Hesin setningur var byrjan uppá eitt skeldarí um kvinniligu krimibøkurnar, ið hava havt stóra framgongd seinastu árini.

Eldri mannligir høvundar fylgdu Bjørn Ranelidsa dømi og kallaðu bøkurnar hjá Camillu Læckberg fyri novellir úr ungdómsblaðnum »Min hest«.

At kvinnur skriva lættari, og kanska betri, hevur verið torført hjá royndum mannligum høvundum at svølgja, og at kvinnurnar hava selt nógv fleiri bøkur enn mannligu starvsfelagirnir er eisini komið illa við.

Men spurningurin er, um tað ikki eisini gagnar mannligu høvundunum, at nógvar bøkur verða seldar.

Um áhugin fyri bókunum veksur, gagnar tað bókaforløgnum og mentan, og í síðsta enda dryppar hetta nokk eisini á mannligu høvundarnar.

## Drotningin og hennara prinsessur

Liza Marklund er tað navn, sum fyrst verður nevnt, tá ein tosar um norðurlendskar krimibøkur. Óivað er hetta, tí hon var fyrst, í 1998, við bókini um gerandishetjuna Anniku Bengtzon.

Tað, sum merkir nógvar av kvinnuligu krimibókunum, er, at tær blanda gerandisdagin og samband millum fólk við søgum um dráp og politiarbeiði.

Hetta lokkar ein breiðan flokk av lesarum, ið dáma væl at lesa um samband millum fólk og bleytu virðini.

## Arbeiða saman

Camilla Læckberg hevur sagt í einari samrøðu, at størsti munurin, sum hon heldur seg síggja millum kvinnuligar og mannligar krimibøkur er, at hetjan í mannligu bókunum er ein einsamallur, skrappur maður, ið oftani arbeiður sjálvur, meðan hetjan í kvinnuligu bøkrunum arbeiður saman við starvsfeløgnum fyri at loysa morðgátuna.

Kvinnuligu rithøvundarnir halda eisini saman, men kappast samstundis eisini um somu lesarar. Allar eru umsettar til fleiri ymisk mál – Liza Marklund til heili 40 mál – og hava selt milliónatals bøkur.

At tær eru ríkar, er onki tær dylja. Camilla Læckberg er opin fyri, at hon skrivar fyri at tjena pening, og tað irriterar nógvar høvundar, ið hava torført at fáa bøkurnar út til almenningin.

– Eg eri stolt, tá eg síggi mítt stóra hús her í Stockholm, og eg hugsi, at hetta havi eg arbeitt fyri við mínum bókum, sigur Læckberg.

## Arbeiðslív

Fleiri av krimidrotningunum hava starvast sum blaðkvinnur, áðrenn tær byrjaðu at skriva bøkur. Liza Marklund á svenska blaðnum Expressen, Hanne Vibeke Holst á Berlingske Tidende og Gretelise Holm á fleiri ymiskum bløðum og sum skúlastjóri á Danmarks Journalisthøjskole. Anne Holt var ráðharri og Karin Fossum var yrkjari.

Í samrøðum hava fleiri av teimum sagt, at ein grund til teirra framgongd er, at tær hava nógvar royndir frá arbeiðslívi og lívinum sum heild. Allar eru mammur og eru ella hava verið giftar.

– Tað er ótrúliga torført at skriva krimibøkur. Fyri at skriva eina góða bók má ein hava okkurt at siga, og tað krevur kunnleika og innlit í samfelagið, sigur Liza Marklund.

### LIZA MARKLUND

**Fødd:**
1962
**Bústaður:**
Spania
**Familja:**
Maðurin Mikael Aspeborg og trý børn




**Bøkur:**
En plats i solen, Livstid, Nobels testamente, Det finns en särskild plats i helvetet för kvinnor som inte hjälper varandra, Asyl, Den röda vargen, Prime time, Paradiset, Studio sex, Sprängaren, Gömda

MYNDIR: BÓKAFORLØGINI